LM-011/2023

Fylgiskjal 1

Fráboðan um politiska undirtøku fyri Føroya Arena

Vegna politisku flokkarnar á Løgtingið vilja vit við hesum boða frá, at vit vilja veita stuðul til verkætlanin Føroya Arena, soleiðis sum hon er framløgd fyri floksumboðum.

Við Føroya Arena fáa Føroyar eina høll, sum kann hýsa stórum ítróttatiltøkum, konsertum, ráðstevnum og mentanartiltøkum av alskyns slag – og ikki minst eina høll, sum hevur altjóða góðkenning til at vera heimavøllur hjá einum stórum parti av innandura ítróttagreinunum í Føroyum.

Tí veita vit verkætlanini, ið umfatar bygging av Føroya Arena okkara stuðul.

Vit taka undir við, at játtaðar verða ialt 30 mió. kr. fyri fíggjarárini 2022, 2023, 2024 og 2025, herav eru longu játtaðar 5 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 2022

Treytirnar fyri tilsøgnini er:

- at aðrir ileggjarar binda seg til at fíggja samlaðu verkætlanina
- at landsstýrið tryggjar sær, at øll formlig viðurskifti kring sjálvsognarstovnin, ið skal standa fyri bygging og fígging, eru í lagi og lúka allar treytir fyri ætlaða virkseminum
- at landsstýrið skal góðkenna reglugerðir fyri sjálvsognarstovnin og ætlaða virksemið
- at flokkarnir regluliga verða kunnaðir um gongdina við verkætlanini

Á Løgtingið, fríggjadagin 18. mars 2022

vegna Fólkaflokkin

vegna Javnaðarflokkin

vegna Sambandsflokkin

vegna Tjóðveldi

vegna Miðflokkin

vegna Framsókn

vegna Sjálvstýrið